

**TOYOTA AVENSIS 2,0 D4-D TERRA**

**Skrásetingarnr.:** GB 644 **KM:** 96.000
**Árgangur:** 20.11.01 **Seinast sýnaður:** 11.02.05

**Útgjald: kr. 37.150,- Kr. 148.000,-**



**TOYOTA CARINA E 1,6 XLI SEDAN**

**Skrásetingarnr.:** F 52464 **KM:** 117.800
**Árgangur:** 01.01.95 **Seinast sýnaður:** 06.09.05

**Kr. 48.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA FREETRONIC** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HM 192 **KM:** 45.000
**Árgangur:** 20.11.01 **Seinast sýnaður:** 14.02.05
**Viðmerking:** Vanligt gearskifti, men automatisk kopling.

**Útgjald kr. 21.650,- Kr. 86.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** RB 572 **KM:** 120.000
**Árgangur:** 16.10.97

**Kr. 55.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD Stw.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MD 583 **KM:** 87.000
**Árgangur:** 29.09.98 **Seinast sýnaður:** 09.08.04
**Viðmerking:** El rútar - el spegl - fløguspælara - krók - hæddarstilling av lyktum - 4 x airbags

**Útgjald kr. 34.510,- Kr. 98.000,-**



**CITROEN XSARA 2,0 HDI** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** JG 709 **KM:** 55.000
**Árgangur:** 14.03.03 **Seinast sýnaður:** 14.03.03
**Viðmerking:** Aircondition - fjarðstýrt sentrallás - elrútar o.a.

**Útgjald kr. 32.150,- Kr. 128.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA H/B**

**Skrásetingarnr.:** RV 511 **KM:** 115.000
**Árgangur:** 27.04.99 **Seinast sýnaður:** 04.03.04

**Útgjald kr. 24.010,- Kr. 68.000,-**



**FORD MONDEO 1,8 TD**

**Skrásetingarnr.:** DJ 945 **KM:** 107.000
**Árgangur:** 14.08.98 **Seinast sýnaður:** 01.03.05

**Útgjald kr. 22.960,- Kr. 65.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,0 H/B TERRA V/KOMF** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** HF 186 **KM:** 31.000
**Árgangur:** 16.01.03 **Seinast sýnaður:** 16.01.03
**Viðmerking:** Fjarstýrt sentrallás - Leðurróður - Radio/CD - Elrútar framman

**Útgjald kr. 27.650,- Kr. 110.000,-**



**RENAULT TWINGO 1,2 EASY**

**Skrásetingarnr.:** PF 319 **Seinast sýnaður:** 01.02.04
**Árgangur:** 19.03.96

**Kr. 24.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

**Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar**

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvìk • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

**REYNI SERVICE** P/F




*Íslendska skipið Valur, sum rak mannleyst vestan fyri Føroyar í vikuskiftinum*

*Mynd: www.skip.is*

# Mannleyst skip við Føroyar

**Leygardagin boðaði Sjóbjargingarstøðin frá, at eitt skip rak mannleyst við Føroyar. Talan var um íslendska línubátin Valur, sum var á vegis til Danmarkar til upphøggingar**

MANNLEYST SKIP
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Ein sleipibátur sleipaði skipið til Danmarkar, men í ringa veðrinum, sum hevur verið, slitnaði ketan millum sleipibátin og Val.

**Sleipaður inn á Skála**

Sleipibáturin helt tó leiðina fram til Danmarkar, og tí lá Valur og rak mannleysur vestan fyri Føroyar. Skipið var komið inn í føroyskt øki, og leygarmorgunin, tá Sjóbjargingarstøðin boðaði frá um mannleysa skipið, lá Valur á positiónini 62 gradir og 48 minuttir norður, og 9 gradir og 56 minuttir vestur.

Brimil setti leygardagin kós móti mannleysa skipinum, og sunnunáttina kom hann til Val. Um hálvgum fimmtíðina sunnumorgunin var fast millum Val og Brimil, og so varð aftur farið undir at sleipa íslendska skipið. Leiðin gekk síðani inn á Skála, har skipini bæði komu seinnapartin sunnudagin.

Valur verður fyribils liggjandi á Skála, inntil greitt verður, hvat nú skal henda við skipinum.

Valur er er bygdur í Svøríki í 1963, og hann er 33 metrar langur og knappar sjey metrar breiður. Íslendski línubáturin er 169 bruttoregistartons til støddar, og hann er heimahoyrandi í Reykjavík.

## Náttúrugripasavnið opið alla heystfrítíðina

Hesa vikuna, sum jú er heystfrítíðin hjá skúlabørnum, hevur Náttúrugripasavnið sonevndan heystfagnað við bæði uppgávum og spølum til børnini.

Heystfagnaður hevur áður verið á Náttúrugripasavninum, men í ár verður denturin lagdur á tær føroysku blómurnar.

Fýra blómuoyggjar eru bygdar upp inni í framsýningarhølunum. Her kunnu børn leita fram tær ymsu blómurnar og á tann hátt læra um føroysku náttúruna, meðan tey spæla.

Heystfagnaðurin er felags tiltak hjá Náttúrugripasavninum og Jarðfrøðissavninum. Framsýningarnar eru opnar frá mánadegnum 10 oktober til fríggjadagin 14. oktober frá kl. 11 til 16.

Tað er ókeypis atgongd í heystfrítíðini.

**tn**

## Fjallmaður í Funningi fekk skaða

Útvarpið visti á miðdegi leygardagin at siga, at ein fjallmaður í Funningi var áhalsin, tá ið menn vóru á fjalli í morgun.

Maðurin datt í eitt gil og bleiv fluttur á Landssjúkrahúsið við tyrluni.

Tíbetur letur tað til, at maðurin ikki hevur fingið nakran álvarsligan skaða, og leiðarin hjá Eiðis Bjargingarfelag, Eyðbjørn Mørkøre, segði við útvarpið, at tað gekk ógvuliga skjótt hjá tyrluni at koma á staðið og fáa mannin fluttan til Havnar.

## J-dagur 4. november

Fríggjadagin 4. november er dagurin, tá ið bryggjaríini í Føroyum og Danmark koma á marknaðin við teirra Jólabryggi.

Restorffs Bryggjarí kemur aftur við Jólatrøllinum. Ætlanin er at gera eina royndarsmakking, so føroyingar kunnu atkvøða um, hvat føroyskt jólabryggj teir halda, er tað besta.